CUBA-tíðindi

PRENSA LATINA - FØROYA DEILD
P.O. Box 2055 FR 165 Argir
Føroyar (Islas Feroe)
Telefon Int +298 13016
Fax Int +298 13824

USA og teldustuldur

WASHINGTON (PRENSA LATINA 20/5). Amerikonsku tollmyndugleikarnir góvu einans 21 av teimum 400 teldunum, sum teir høvdu lagt hald á, aftur til felagsskapin »Prestar fyri Frið«. Hesin felagsskapur skuldi fyrr í ár fara til Kuba við heilivági, bíblium, teldum o.m.ø. Teldurnar skuldu nýtast í einum innlendis sjúkrahúskelduskervi í Kuba. Hesum loyvdu amerikonsku myndugleikarnir bara ikki. Hald varð lagt á tær 400 teldurnar, sum komu úr Kanada, og nú vórðu so einans 21 latnar felagsskapinum aftur í San Diego, Kalifornia, so at tær kunnu fara gjøgnum Meksiko til Kuba. Leiðararnir fyri hjálparfelagsskapin, amerikanski baptistapresturin Lucius Walker og triggir aðrir prestar høvdu 20. mai verið í hungursverkfalli í tilsamans 86 dagar undir herrópinum »Føsta fyri lív« fyri at noyða amerikonsku stjórnina at geva aftur stolnu gávuna, hóast blokaduna av Kuba.

Meksikanskar stóríløgur í Kuba

MEKSIKO BYUR (PRENSA LATINA 13/5). Meksikanska statsbyggifelagið í Nuevo Leon hevur avgjørt at gera íløgur í Kuba upp á 500 mill. US dollarar komandi fimm árini, hóast hóttanunum frá Helms Burton lógini, sum loyvir USA at revsa júst slíkum íløgum í Kuba, framdar av fremmandum londum. Tíðindini vórðu kunngjørd av stjóranum á tøknifrøðiliga universitetinum í Monterrey, Alejandro Ibarra, sum greiddi frá, at eftir at Kuba hevði loyvt slíkum íløgum fyrst í níttiárunum, hava mangar meksikanskar, kanadiskar og serliga europeiskar fyritøkur gjørt stóríløgur í Kuba.

Kubanskur framburður í námsvinnuni

HAVANNA (PRENSA LATINA 16/5). Kuba roknar við at framleiða 50.000 tons av nikkul og kobolt í 1996, kunngjørdi kubanski vararáðharrin fyri ídnað. Hann segði, at 1995 framleiðslan var 42.000 tons, so her er talan um munandi framburð. Kuba fer at luttaka á framsýningini EXPOMIN-96, sum skjótt fer fram í Santiago de Chile.

Met í sukurgrøðini

HAVANNA (PRENSA LATINA). Eftir ógvusliga fallið í sukurgrøðini vegna skrædlið í Sovjet og Eysturevropa – og harav ógvusligum falli í oljuinnflutningi – er kubanska sukurgrøðin nú á veg uppaftur. Nú eru kubanar komnir upp um eina millión tons meira enn í 1995. Tá hon var minst, var hon niðri á 2,5 mill. tonsum, men í ár koma teir upp á 4,5 mill. tons. Framburðurin er eitt úrslit av øktum virkisføri og øktari kapping millum landspartarnar. Fyribils liggur Holguin í Eysturkuba á odda.

Flogskiparin misti pappírini

HAVANNA (PRENSA LATINA 17/5). Kubanska uttanríkismálaráðið kom í dag við kunngerð um amerikanska flogskiparan Jose Basulto, sum kom livandi aftur til USA eftir at hava verið inni í kubanskum loftrúmi 24. februar í ár saman við øðrum flogfari, sum varð niðurskotið av kollveltingarliga flogvápninum, sum hevði ávarað teir fleiri ferðir. Báðir vóru teir eisini fleiri ferðir ávaraðir av FBI um ikki at gera atsóknir móti Kuba. Nú hava so amerikonsku samveldismyndugleikarnir tikið flogskiparapappírini frá Jose Basulto, eftir at fullgóð prógv vóru fyri, at hann hevði verið væl innan fyri kubanskt mark. Hann hevur nú hvørki loyvi at flúgva sum flogskipari ella sum hjálparmaður umborð.

Oljufyrisitingin og Oljuráðleggingarnevndin hava havt úr at gera orsakað av tí sera stóra útlendska áhuganum fyri tí føroyska økinum. Her vitjar BP og Árni Olafson greiðir frá. Mynd jan

Árni Olafson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini:

Oljulóggávan helst nakað seinkað

Áhugin fyri føroysku undirgrundini hevur verið so mikið nógv størri enn roknað varð við frá byrjan, at arbeiðsuppgávurnar hjá bæði Oljufyrisitingini og Oljuráðleggingarnevndini eru vorðnar nógv størri. Tilmælið til myndugleikarnar verður tí seinkað

Jan Müller

Frágreiðingin, sum Oljuráðleggingarnevndin ger til myndugleikarnar viðvíkjandi eini komandi oljulóggávu, verður helst seinkað nakrar mánaðir.

Orsøkin er ikki politiska kreppan, sum verið hevur, men heldur tann, at arbeiðsbyrðan og -uppgávan hevur verið størri enn upprunaliga mett.

-Vit hava helst verið í so bjartskygdir, sigur formaðurin í nevndini, Árni Olafson við Tíðindablaðið Sosialin. Ætlanin var at vera liðugur við frágreiðingina í mai ella juni, men nú verður tað neyvan fyrr enn til heystar, t.v.s. í oktober ella november, váttar formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini.

Tá skal landsstýrið viðgera málið, og síðani skal øll lóggávan og annars oljumálið alt sum tað er til aðalorðaskifti í tinginum.

Árni Olafson torir ikki at útiloka, at hetta orðaskiftið í fyrsta lagi verður móti ársloki ella kanska inn í næsta ár.

Størri arbeiðsuppgáva

Vit spurdu Árna Olafson, um arbeiðið at gera uppskot til eina oljulóggávu og tað hartil hoyrir hevur verið ikki bara drúgvari men eisini torførari enn mett frá byrjan?

Ein dugar ikki altíð longu frá byrjan at ímynda sær, hvussu stórt arbeiðið verður. Men tá ein so hevur sett spónin í greytin, verður ein eisini eitt sindur klókari og finnur út av fleiri viðurskiftum, sum greiða skal fáast á.

Árni Olafson sigur, at teir sjálvandi vilja gera sítt ítarsta fyri at fáa eina frágreiðing sum er so góð sum til ber, tí hetta er nakað nýtt og eisini sera týdningarmikið fyri framtíðina. Tí er eisini betur at vera fyrivarin heldur enn eftirsnarin.

Í øllum hesum er tað eisini rættiliga avgerandi at finna eina javnvág millum okkara egnu ynski og krøv og tað, sum oljuvinnan roknar við.

Árni Olafson viðgongur, at hetta er ein sera torfør uppgáva, kanska mest tí at tann faktorurin, sum er einamest avgerandi fyri at kunna gera hetta av, eru líkindini til at finna olju.

-Høvdu vit vitað meira um, hvussu sannlíkt tað er at finna olju og kanska eina hóming av, hvat er til av olju, so høvdu vit við nógv tryggari hond kunnað peikað á, hvar tann javnvágin millum føroyska samfelagið øðrumegin og oljufeløgini hinumegin skal vera.

Lond í Vestureuropa sum fyrimynd

Uppá fyrispurning um tað er nakað ávíst land sum Oljuráðleggingarnevndin brúkar sum fyrimynd fyri sínum metingum og komandi tilmæli sigur Árni Olafson, at teir hava gjørt eitt stórt arbeiði til tess at kunna seg við lóggávuna í fleiri øðrum londum og ikki minst royndirnar av hesum lóggávum, og at ætlanin er at brúka vestureuropeisk konsessiónsmodell.

-Tað haldi eg eisini oljufeløgini vænta av okkum og høvdu tey helst blivið nakað kløkk, um vit ikki gjørdu tað.

Hóast møguligar seinkingar í arbeiðinum at gera uppskot til oljulóggávu, so heldur Árni Olafson, at ein konsessiónsrunda kann koma uppá tal miðskeiðis ella í besta føri tíðliga í 1997 - um ikki okkurt heilt óvæntað kemur í vegin.

Størri áhugi enn nakar droymdi um

Formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini heldur annars, at áhugin frá útlendskum oljufeløgum fyri føroyska økinum hevur verið størri, enn roknað varð við.

-Lesur ein okkara frágreiðing frá 1993 leggur ein merki til, at vit løgdu ógvuliga varisliga upp til at gera eina lítla oljufyrisiting, sum skjótt kundi takast av aftur, um so var, at einki var í øllum hesum. Tað hevur so víst seg, at hon hevur hendurnar fullar hvønn dag, t.v.s. bæði at arbeiða fyri Oljuráðleggingarnevndina og at røkja umsóknir og fyrispurningar og sambandi við oljufeløg og hvørt av sínum. Alt tað arbeiðið, sum er vent ímóti teirri altjóða oljuvinnuni, hevur verið nógv nógv størri í vavi enn vit høvdu droymt um. Høvdu vit dugað at ímyndað okkum tað tá, tá høvdu vit kanska eisini havt lagt upp til eina størri umsiting.

-Er hon kanska vorðin ov lítil longu?

Ja, tað vil eg siga. Tey, sum arbeiða har, gera eitt sera gott arbeiði og hava sera nógv um at vera.

Árni Olafson heldur, at tað merkir týðuliga teirra vilja til at arbeiða, at tey gera eitt pionerarbeiði.

Men hann dylur ikki fyri, at heldur gongdin fram, so verður neyðugt at seta fleiri pengar av til hetta økið.

Vit spurdu Árna Olafson, um hann er positivt yvirraskaður av teimum úrslitum, sum eru komin fram higartil í sambandi við forkanningarnar?

-Tað haldi eg avgjørt. Tað hevur nokk gingið betur at vísa á, at tað er okkurt áhugavert er at síggja undir basaltinum.

-Men hvat sigur tú til, at útlendsku feløgini eru farin at vísa Føroyum áhuga við eitt nú at lýsa í bløðunum eftir fólki til teirra skip og at láta stuðul til útbúgving av føroyingum?

-Tað sær sera áhugavert út og er ein góður útviklingur

AMOCO
BP
elf
HYDRO
PHILLIPS 66
saga
STATOIL